# What's Left?



## Hví liggur Javnaðarflokkurin søguliga lágt í seinastu veljarakanning? Fimm fólk við formligum ella óformligum tilknýti til føroyska vinstravongin hava fingið hendan spurning. “Politiskt og ideologiskt tómrúm” er afturvendandi svarið

### Javnaðarflokkurin



**Heini í Skorini**
heini_skorini@yahoo.com

Ein prúður maður í síðum frakka setir knyklar í brýr í hornaskrivstovuni í einum pompøsum glasbygningi á Argjum. Á skrivaraborðinum liggja rokniørk við reyðum tølum. Og hann veit, at hann gongur eini torførari tíð á møti.

Seinasta veljarakanningin gav flokkinum 14 prosent og fimm tingfólk, sum er verri enn vanlukkuliga valið í 1994, tá føroyski Javnaðarflokkurin við Atla Dam, sála, small í svørðin og misti nærum helvtina av sínum atkvøðum frá framúr valinum í 1990, tá Javnaðarflokkurin náddi tindunum og fekk tíggju tinglimir. Onkur skuldi revsast fyri áleikandi kreppuna. Flokkurin fekk 15 prosent, og tað var ringasta úrslitið síðani heimastýrislógina.

Javnaðarflokkurin megnaði tó at stabilisera seg aftur rundanum tey tjúgu prosentini frá 1998, eftir at protestflokkurin Verkamannafylkingin var syndrað og partar av henni komnir umborð aftur á javnaðarskútuna. Men síðani seinasta val, tá flokkurin fór úr sjey niður í seks tinglimir, eru myrk skýggj aftur at hóma. Ikki tí, at ein katastrofal veljarakanning neyðturviliga merkir eitt líka vánaligt val. Men kanningin var ein ábending, sum fekk reyðu ávaringarlampurnar at lýsa.

Flóvin Eidesgaard, búskaparfrøðingur og fyrrverandi ráðgevi hjá Javnaðarflokkinum, metir, at afturgongdin í seinastu veljarakanning ikki er ein fyribils trupulleiki.

– Flokkurin hevur havt eina støðuga afturgongd síðani 1990. Gott nokk gekk flokkurin fram í 1998, men tað var í ein mun orsakað av, at Verkamannafylkingin fór í søguna. Einasta veruliga framgongdin var á valinum í 2004, sigur Flóvin Eidesgaard.

### Svikin hugsjón

Formaðurin Jóannes Eidesgaard hevur eftir nýggjastu veljarakanningina sagt, at flokkurin dugir ikki nóg væl at selja sín boðskap. At flokkurin dugir ikki at markera síni avrik, so tey geva afturljóð í fjølmiðlunum og í fólkinum.

Men onnur meta, at trupulleikin er størri og meiri grundleggjandi enn marknaðarføring og spinnarí.

Ein teirra er stjórnmálafrøðingurin og forkvinnan í fakfelagssamtakinum Samtak, Sonja Jógvansdóttir. Undir liðini á strongu forkvinnuni í Føroya Arbeiðarafelag, Ingeborg Vinther, sum við jøvnum millumbilum langar út eftir Javnaðarflokkinum, er Sonja Jógvansdóttir eisini farin at seta spurnartekin við, hvussu sosialdemokratisku virðini í roynd og veru hava tað á lista C.

– Tað er vorðin ov stórur munur á, hvat flokkurin sigur, og hvat flokkurin ger. Og vit hava ikki brúk fyri einum Javnaðarflokki, sum ikki førir javnaðarpolitikk. Flokkurin er ikki longur verjin hjá teimum veiku og sosialt útsettu bólkunum, sigur Sonja Jógvansdóttir, sum í lesarabrævi fyri stuttum proklameraði, at “sosiala kumpassin má rættast”.

Av aktuellum dømum vísir hon til deild 1 á psykiatrisku deild, sum verður stongd vegna sparingar. Hon vísir á eina avoldaða forsorgarlóg, sum eingin ger nakað við. Hon vísir á korini hjá børnum og ungum við serligum tørvi, sum gerast verri og verri. Og hon vísir á stuðulin til heilivág, sum nú er skerdur. Sparingar, sum allar raka bólkar, ið Javnaðarflokkurin sigur seg umboða.

– Tað merkir ikki, at Javnaðarflokkurin absolutt einki hevur avrikað. Men úrslitini eru ov sporadisk. Listin av avrikum er ov lítil. Og tað er bara ikki gott nokk, tá flokkurin hevur sitið við stjórnarvaldinum síðani 2004, sigur forkvinnan í Samtaki.

Hesi diagnosu tekur gamli javnaðarmaðurin Jóannes Dalsgaard undir við. Hann hevur sitið á tingi fyri flokkin í tíggju ár, men rýmdi í 1992 í mótmæli ímóti ógvusligum sparingum á landssjúkrahúsinum.

– Tað er trupult at síggja mun á Javnaðarflokkinum og borgarligu flokkunum, íroknað Tjóðveldi. Flokkurin hevur góðtikið privatiseringar og skattalættar í ABC samgonguni, og nú signalerar hann, at vit ikki longur kunnu varðveita støðið á vælferðarsamfelagnum, sigur Jóannes Dalsgaard. Fyri gamla javnaðarmannin er tørvur á einum mótspæli til marknaðarkapitalismu og “borgarliga

> *– Javnaðarflokkurin fær einans siðbundnu veljararnar aftur, um hann leggur fram eitt greitt sosialdemokratiskt alternativ til borgarligan politikk*
>
> *Jóannes Dalsgaard, fyrrverandi tinglimur fyri Javnaðarflokkin*

Sosialurin